# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Una Egilsdóttir og Theresa Joensen:

## – Á Landssjúkrahúsinum er genialt

**Una Egilsdóttir og Theresa Joensen, ið ganga í 9. a í Vágs skúla, valdu báðar at fara í starvsvenjing á landssjúkrahúsinum, og tað angra tær ikki. Tær siga, at har er sera gott at vera, og starvsfólkini eru sera fitt og blíð**

STARVSVENJING
*Rani Nolsøe Johannessen*

*Hví valdu tit júst hetta arbeiðsplássið?*
Tí hetta er nakað, ið hevur okkara áhuga.

*Hvat dámar tykkum at verða her?*
Tað er genialt, og øll eru eisini so fitt og blíð.

*Hvat hava tit gjørt higartil?*
Vit byrjaðu á goymsluni, arbeiddu í køkinum, á vaskarínum, og nú eru vit so við portørunum har vit koma við teimum runt allastaðni.

*Kundu tit hugsað tykkum at arbeitt við hesum í framtíðini?*

Ja, alt kann henda.
*Gleða tit tykkum til at sleppa í skúla aftur?*
Vit gleða okkum at sleppa suður aftur, men ikki í skúla.

*Hvussu er at vera í Havn?*
Tað var fínt teir fyrstu dagarnar, men okkum dámar betur í Vági, tí har er best.



*Una Egilsdóttir (v.m) og Theresa Joensen úr 9. a í Vágs skúla, eru í starvsvenjing á Landssjúkrahúsinum*

Terji Jacobsen, praktikantur:

## Frá at mjólka neytum til at telja pengar

**Terji Jacobsen var annar av tveimum dreingjum í 10. flokki í Sørvágs skúla, sum var í starvsvenjing í Havn. Vit vóru í Føroya Banka, har hann var í starvsvenjing, fyri at spyrja hann nakrar spurningar**

STARVSVENJING
*Poul Hallur Davidsen*

*Hví valdi tú júst hetta starvið?*
Tí at eg skuldi royna okkurt heilt annað, enn eg royndi seinast, tá ið eg var í starvsvenjing hjá bóndanum í Bø.

*Hvat dámar tær at vera her?*
Hampuligt

*Hvat hevur tú gjørt higartil?*
Talt pengar, og so havi eg fingið at vita, hvussu man arbeiðir í einum banka

*Hvat gert tú beint nú?*
Sperri kort sum feilur er í

*Kundi tú hugsað tær at arbeitt við hesum í framtíðini?*
Nei, tí at hettar er ikki júst eg

*Gleðir tú teg at fara aftur í skúla?*
Nei, gleði meg ikki at fara í skúla

*Hvussu er at verða í Havn?*
Eg haldi at tað er fínasta slag



*Terji Jacobsen í 10. flokki í Sørvágs skúla, er í starvsvenjing í Føroya Banka í Havn*





Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**
Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin
"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo

Sosialurin -har tað hendir


## Vestmanna Kirkjukór við nýggjum og gomlum myndum

Stuðulskalendari fyri Vestmanna Kirkjukór





*Farið inn í hans portur við lovi, í forgarðar hans við prísi! Lovið honum! Signið hans navn! Sálmur. 100,4*

**Seinastu 6 árini hevur Vestmanna kirkjukór skipað fyri fleiri tiltøkum í Vestmanna og eisini sungið í kirkjum runt um í Føroyum, seinast í Fuglafjarðar kirkju, og konsert í Vestmanna kirkju**

Kórið, sum hevur um 40 limir, hevur skipað fyri sangi til ymisk høvi í bygdini eitt nú til 1. maidagshaldið, eisini hugnaltiltøk sum t.d. bindiklubbaveislum fyri konufólkini í bygdini, sum hevur fingið stóra undirtøku.

Fyrsta dagin kemur stuðulskalendari teirra út, og vit hava fingið loyvi frá kórinum at kaga í kalendaran, sum er prýddur við vøkrum myndum á báðum síðum. Vert er at gera vart við, at kórið á hvørjum ári nýtir gamlar myndir saman við nýggjari myndum eisini, so fólk kunnu tosa um nýtt og gamalt, tá kalendarin kemur inn á hurðina.

Á januar/juni síðuni eru myndir av Vestmanna bygd - onnur er ein nýttársmynd frá uml. 1985 og hin er ein vár / summarmynd frá umleið 1960. Á juli/desembur síðuni eru myndir frá Vestmanna kirkju. Nú kirkjan er umbygd og ístandsett, hevur kórið nýtt høvið at avmynda gomlu og nýggju altartalvurnar. Sum tað sæst á myndunum, so er valið, tað at avmynda altartalvurnar, eitt gott val, tí hetta er sanniliga eitt áhugavert myndaevni.